

# 2025

## Environmental, Social og Governance (ESG) frágreiðing

P/F Fønix

Fønix

# INNIHALDSYVIRLIT

## INNLEIÐSLA

3 ESG EYGNAKAST
4 FRÁGREIÐING FRÁ LEIÐSLUNI
5 OKKARA MÁL FYRI BURÐARDYGGUM VIRKESMI
6 3 ÁRA YVIRLIT

## NOTUR

7 UMHVØRVI
9 SOSIALT
10 LEIÐSLA

## VÁTTAN

11 VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA



# ESG EYGNAKAST

## UMHVØRVI

Mál felagsins fyri útlát av $CO_2e$ vav 1 og 2 er at í 2028 skal útlátið verða undir 85 tons tilsamans. Í 2025 hevur felagið framhaldandi gjørt íløgur fyri at minka um útlátið, og útlátið fyri vav 1 og 2 er í 2025 mált at verða:

**83,9 t $CO_2e$**

og er hetta ein hækking uppá 6,4 tons.

Vatnnýtslan varð máta á fyrsta sinni í 2023, og bleiv tá máld til 391 $m^3$, og í 2025 var vatnnýtslan 130 $m^3$. Málið er at felagið heldur seg undir 150 $m^3$ árliga.

## SOSIALT

Lyklatølini innan sosiala økið hyggja serliga at starvsfólkunum, teirra ymiskleika og trygd, og hvussu tey støðast og trívast.

Sjúkrafrávera var á fyrsta sinni skrásett í 2024, og hevur Fønix sett sum mál at fráveran er undir 2 dagar pr ársverk (FTS). Í 2025 var fráveran

**0,65**

dagar pr ársverk. Hetta er væl undir málinum. Í 2024 var sjúkrafráveran 0,4 dagar pr ársverk.

Vit ynskja, at okkara starvsfólk trívast, og at størsti parturin av starvsfólkunum eru í føstum starvi. Hetta skal eisini síggjast á okkara starvsfólkaskifti, sjúkrafráveru og trygd á arbeiðsplássinum.

## LEIÐSLA

Vit ynskja áhaldandi at hava ymiskleika í nevndini, og at nevndin raðfestur nevndararbeiðið. Lyklatølini innan sosiala økið hyggja serliga at starvsfólkunum, teirra ymiskleika og trygd, og hvussu tey støðast og trívast.

Málsetningurin fyri útlendingar í nevndini er, at í 2028 eru ≥25% útlendingar umboðandi nevndina. Í 2025 vóru:

**33%**

Ein stór hóttan móti fyritøkum í dag, er brot á KT trygd. Tí skal leiðslan áhaldandi arbeiða við at menna KT trygdina og tryggja, at óviðkomandi ikki óætlað fáa atgongd til telduskipanir hjá Fønix.

# FRÁGREIÐING FRÁ LEIÐSLUNI

Fønix er heildarveitari av køli- og ídnaðargassi, sveisiútgerð, trygdar- og bjargingarútgerð, smyrjievni, akkumulatorum og aðrari arbeiðsútgerð.

Sum virðisgrundarlag er Fønix kent fyri:

- At vera ein álítandi samstarvsfelagi
- At dygd, trygd og trivnaður er í hásæti
- At øll søla og øll arbeiði vera væl úr hondum greidd til kappingarførar prísir
- At vera eitt lokkandi arbeiðspláss við skipaðum viðurskiftum á øllum økjum

Sum málsetning arbeiðir Fønix støðugt fyri:

- At fasthalda støðuna, sum ein av fremstu fyritøkum á føroyska marknaðinum
- At skapa nøktandi fíggjarlig úrslit
- At varveita eitt fakligt og sosialt umhvørvi, soleiðis at røttu fakfólkini trívast í felagnum
- At vaksa um virksemið, við at troyta aðrar marknaðir, um hetta kann gerast við einum nøktandi fíggjarligum úrsliti, í mun til váðan

Hjá Fønix leggja vit stóran dent á at hava eitt gott og trygt arbeiðsumhvørvi og fyribyrgja eftir førimuni ótryggar og vandamiklar støður.

- Øll starvsfólk hava neyðuga vitan og førleikar til ta uppgávu, tey skulu loysa
- Øll starvsfólk hava kravda og/ella viðmælda trygdar- og verndarútgerð til tær uppgávur, ið viðkomandi ger
- Øll starvsfólk hava atgongd til, og skulu brúka røttu amboðini til ymisku uppgávurnar, ið tey loysa
- Øll starvsfólk gera sítt til, at virkið er reint og ruddiligt, og ansa væl eftir ikki at dálka umhvørvið óneyðugt
- Øll starvsfólk hava skyldu til beinanvegin at boða frá, um tey staðfesta eina ótrygga ella vandamikla støðu, ið kann gera skaða á fólk, útgerð ella umhvørvið

Vit halda landsins lógir og myndugleikakrøv og fylgja við viðmælum innan heilsu, trygd og umhvørvi.

Við hesum virðisgrundarlagi, málsetningum og fokus á trygd ynskja vit, at Fønix hevur positiva ávirkan innan burðardygd í breiðastu merking, bæði umhvørvisliga (**E**nvironment), sosiala (**S**ocial) og innan leiðslu (**G**overnance). Vit ynskja tí at hava eina ESG frágreiðing, sum staðfestir okkara mál og skjalprógvar gongdina innan ESG.



**Bárður Simonsen**
stjóri

# OKKARA MÁL FYRI BURÐARDYGGUM VIRKSEMI

Fønix hevur valt at boða frá 22 ESG lyklatølum í 2025, sum vit meta kunnu gera mun innan umhvørvi, sosialustøðuna og leiðsluna av fyritøkuni.

Innan umhvørvið hevur Fønix ávirkan á egna orkunýtslu og egið útlát og burturkast, tí ynskja vit at seta mál og skjalprógva gongdina innan hesi øki. Vit boða frá samlaðu orkunýtsluni, $CO_2$e útláti í vavi 1 og 2, vatnnýtslu og burturkasti greina í 3 ymiskar bólkar.

Starvsfólkini eru krumtappurin í Fønix. Tí er avgerandi, at tey hava tað gott og kenna seg trygg í starvinum. Hjá Fønix ynskja vit at hava ymiskleika í starvsfólkahópinum, og at setanarviðurskiftir eru rímilig og rættvís.

Hjá Fønix hava øll starvsfólk rætt at skipa seg í fakfelag, og vit halda okkum vekk frá barnaarbeiði. Øll starvsfólk fáa arbeiðsklæðir og útgerð til persónliga vernd.

Lyklatølini innan sosiala økið hyggja serliga at starvsfólkunum, teirra ymiskleika og trygd, og hvussu tey støðast og trívast.

Fønix luttekur aktivt í samfelagnum við at stuðla vælgerandi og mennandi endamálum. Gongdin innan stuðul verður eisini fráboða í ESG frágreiðigini.

Innan leiðslu boða vit frá um nevndarsamanseting og uppmøting á nevndarfundum.

# 3 ÁRA YVIRLIT

| 3 ára ESG yvirlit | Nota | Eind | Mál 2028 | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **UMHVØRVI** | | | | | | | |
| $CO_2$e vav 1 | | T | <60 | 58,5 | 54,9 | 59,5 | 58,9 |
| $CO_2$e vav 2 | | T | <25 | 25,4 | 22,6 | 24,6 | 24,9 |
| Elnýtsla | | MWt | <70 | 77,5 | 77,8 | 73,4 | 76,8 |
| Orkunýtsla | | GJ | <1.000 | 999 | 1.005 | 930 | 984 |
| Parturin av varandi orkukeldum | | % | >15 | 14,2 | 15,8 | 11,8 | 14,6 |
| Burturkast, pappír og papp | | $m^3$ | <40 | 84,0 | 60,0 | 69,6 | 32 |
| Burturkast, battaríir | | kg | | 100 | 80 | 212 | 83 |
| Restburturkast | | $m^3$ | <50 | 52,0 | 47,8 | 57,4 | 28,2 |
| Vatnnýtsla | | $m^3$ | <150 | 130 | 199 | 391 | |
| | | | | | | | |
| **SOSIALT** | | | | | | | |
| Fulltíðar starvsfólk (FTS) | | Ársverk | | 10,9 | 9,5 | 10,5 | 9,7 |
| Føst størv | | Tal | | 11 | 10 | 10 | 9 |
| Parttíðarstørv | | Tal | | 2 | 4 | 4 | 3 |
| Kynsbýti | | % | ≥20 | 19,9 | 21,1 | 18,0 | 12,8 |
| Miðal aldur | | ár | | 42 | 44,2 | 43 | 41 |
| Starvsfólkaumferð | | % | <10 | 9,2 | 0 | 9,5 | 0 |
| Sjúkrafrávera | | Dagar/FTS | <2 | 0,65 | 0,4 | | |
| Trygd (LTI) | | Tal | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 |
| Deyðsfall | | Tal | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Stuðul | | Kr | 300.000 | 322.902 | 221.000 | 396.000 | 130.000 |
| | | | | | | | |
| **LEIÐSLA** | | | | | | | |
| Uppmøting til nevndarfundir | | % | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| Kynsbýti hjá nevnd | | % | ≥25 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útlendingar í nevnd | | % | ≥25 | 33 | 33 | 33 | 33 |

# UMHVØRVI

Niðanfyri verða nýttu roknihættirnir greinaðir. Har talið beinleiðis er upplýst sum lyklatal, so sum undir burturkasti, er eingin rokniháttur at greina.

## 1.1 $CO_2$e útlát

### Økt flutningsvirksemi er orsøk til lítla hækking

Vit miða eftir at minka útlátið frá okkara akførum. Hetta gerst møguligt, sum tøknin mennist. Í 2022 bleiv ein elbilur keyptur og lastbilurin bleiv útskiftur í 2023 til ein meira orkuvinarligan lastbil. Vegna økt flutningsvirksemi, er útlátið í vavi 1 økt við 6,6%. Elnýtslan minkaði eitt vet, men av tí at grøna orkan hjá SEV fór frá 57% til 51%, øktist útlátið í vavi 2 við 12%.

### Nýttur roknskaparháttur

**$CO_2$e vav 1**: Útlátskeldurnar eru propan til upphiting av brúksvatni og diesel og bensin til akfør. Útlátið verður roknað við útlátsfaktorum, sum eru 2,99 kg CO2e/kg fyri propan, 2,87 kg CO2e/litur fyri diesel og 2,55 kg CO2e/litur fyri bensin.

**$CO_2$e vav 2**: Útlátskeldan í vav 2 er termisk orka frá SEV. Útlátsfaktorurin á el verður roknaður út frá, hvussu stóran part av grønari orku SEV veitti í árinum. Útlátsfaktorurin fyri elorku í meginøkinum er 0,327 CO2e/kWt fyri 2025.

## 1.2 Orkunýtsla

### Arbeiða við orkusparandi tiltøkum

Felagið arbeiðir við orkusparandi tiltøkum. Í 2022 blivu sensorar uppsettir á goymslu og verkstaði. Í 2023 blivu ljósini í handlinum skift út til LED. Í 2025 vóru øll ljósini á lagrinum skift út til LED við sensorum. Í 2026 er ætlanin at skifta øll ljós uttan til LED við tíðarstýring.

### Nýttur roknskaparháttur

Orkunýtslan er samlaða orkunýtslan frá propan, diesel, bensin og el, sum verður umroknað við orkufaktorum, sum eru 50,3 MJ/kg fyri propan, 34,2 MJ/litur fyri diesel, 38,6 MJ/litur fyri bensin og 3,6 MJ/kWt fyri veitta elorku.

# 1.3 Vatnnýtsla

## Vatnnýtslan lækkar

Vit ynskja at kenna okkara vatnnýtslu og seta mál fyri hesa, tí sjálvt um vit ikki rinda fyri vatn, er tað umráðandi, at vit ikki brúka meir enn neyðugt av hesum tilfeingi. Vit uppsettu vatnmátara í seinnu helvt av 2022 og kunnu nú upplýsa vatnnýtsluna. Við at máta vatnnýtsluna blívur ein meira tilvitaður um, at hetta er eitt tilfeingi, sum ikki er endaleyst. Vatnnýtslan er minka munandi síðan vit byrjaðu at máta nýtsluna.

## Nýttur roknskaparháttur

Vatnnýtslan verður mátað av vatnmátara.

# 1.4 Varandi orka

## 14,2% av varandi orku

Ein størri elektrifisering leiðir til størri part av varandi orku.

## Nýttur roknskaparháttur

Varandi orkubrøkurin verður roknaður sum veitta grøna orkan frá SEV býtt við samlaðu orkunýtsluni.

# 1.5 Burturkast

## Papppressa skal verða við til at minka burturkast

Burturkast ynskja vit at minka við at pressa papp og skilja pappír frá. Ætlanin er at keypa eina papppressu í 2027. Fønix selur og skiftir battariir og akkumulatorar. Vit meta, tað er betur, at Fønix tekur ímóti og burturbeinir battariir og akkumulatorar, tí vit tryggja altíð, at hesi verða burturbeind á rættan hátt. Vit hava tí ikki sum mál at minka burturbeiningina av battarium. Á sama hátt, meta vit, tað er betur, at dekkverkstøðini burturbeina dekk. Tí burturbeina vit ikki dekk meir.

## Nýttur roknskaparháttur

Øll vektin í burturkasti, sum verður burturbeind, verður greinað í bólkar og skyld sundur samsvarandi háttinum, hvussu hetta verður burturbeint.

# SOSIALT

## 2.1 Starvsfólk

### Sjúkrafráveran 0,65 dagar/FTS í 2025

Vit ynskja, at okkara starvsfólk trívast, og at størsti parturin av starvsfólkunum eru í føstum starvi. Hetta skal eisini síggjast á okkara starvsfólkaskifti, sjúkrafráveru og trygd á arbeiðsplássinum. Í Danmark er vanligt at seta eitt mál fyri sjúkrafráveru millum 2 og 4 dagar pr ársverk. Okkara mál er sett til undir 2 dagar pr ársverk, tó var sjúkrafráveran væl lægri enn hetta í 2025.

### Nýttur roknskaparháttur

**Fulltíðar starvsfólk (FTS)**: FTS er rokna sum tal á fulltíðarsettum + (samlaðir tímar hjá tímaløntum deilt við einum ársnormi). FTS er tí samlað tal av fulltíðarekvivalentum (full time equivalent – FTE).

**Starvsfólkaumferð**: Tal á sjálvbodnum uppsagnum + uppsøgd)/(FTS)*100 Tímalønt telja ikki við.

**Sjúkrafrávera**: (Tal á sjúkradøgum fyri alla arbeiðsstyrkina í árinum)/(FTS)*100

**Kvinnur**: (Kvinnulig FTS)/(FTS)*100

**Miðal aldur**: Miðalaldur á starvsfólkum uttan vekting.

## 2.2 Trygd (LTI)

### Trygd skal raðfestast

Vit hava ikki havt nakra arbeiðsvanlukku síðan 2023, tá ein trukkur bakkaði á eitt starvsfólk. Fyri at minka um møguleikan fyri arbeiðsvanlukkum, eru tríggjar eyka trygdarskipanir settar á trukkin. Hesar eru (1) bakkikamera, (2) ávaringarljóð tá bakkað verður og (3) lasari, sum vísir, hvar trukkurin bakkar. Afturat hesum er bummur settur upp fyri garðin og týðiligari uppmerkt, at óviðkomandi ikki hava atgongd til garðin og goymsluna.

### Nýttur roknskaparháttur

**Trygd (LTI):** Tal á hvussu ofta vit hava mist arbeiðstíð vegna skaðar – fysiskir og psykiskir. Hetta sigur, hvussu ofta skaðar hava leitt til mista arbeiðstíð, har mist arbeiðstíð er definerað sum hendingar, har eitt starvsfólk missur arbeiðstíð vegna skaðan tvs. deyðsfall og dagar vekk frá arbeiði. Skal starvsfólkið á sjúkrahús, men kann koma aftur til arbeiðis eftir viðgerðina, telur hendingin ikki við.

**Stuðul:** Stuðul verður uppgjørdur við uppgerð frá bókhaldið felagsins yvir latnan stuðul í árinum.

# LEIÐSLA

## 3.1 Nevndin

### Ymiskleiki í nevndini

Vit ynskja áhaldandi at hava ymiskleika í nevndini, og at nevndin raðfestur nevndararbeiðið. Í nevndini er ein útlendingur og tveir føroyingar. Ein nevndarlimur er stjóri eini størri danskari fyritøku, ein nevndarlimur er stjóri í størstu fyritøkuni í India og ein er sjálvstøðugur vinnurekandi í Føroyum.

Ein stór hóttan móti fyritøkum í dag, er brot á KT trygd. Tí skal leiðslan áhaldandi arbeiða við at menna KT trygdina og tryggja, at óviðkomandi ikki óætlað fáa atgongd til telduskipanir hjá Fønix.

### Nýttur roknskaparháttur

**Uppmøting á nevndarfundi:** (Tal av nevndarfundum fyri hvønn nevndarlim)/((Tal av nevndarfundum)*(Tal av nevndarlimum))*100.

**Kynsbýtið hjá nevndini:** Veður roknað sum (Aðalfundarvald kvennkyn í nevnd)/(Allir aðalfundarvaldir nevndarlimir)*100.

**Útlendingar í nevndini:** Býtið av nevndarlimum, sum ikki hava føroyskt sum móðurmál. Verður roknað sum (Tal av útlenskum nevndarlimum)/(Tal av nevndarlimum tilsamans)*100.

# VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

## Til partaeigararnar í P/F Fønix

Vit hava fingið til uppgávu at geva eina váttan við avmarkaðari vissu um upplýsingarnar niðanfyri, og sum eru við í ESG frágreiðingini hjá P/F Fønix fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2025.

## Niðurstøða okkara

Grundað okkara arbeiði og skjalprógv, sum vit hava fingið, eru vit ikki komin fram á viðurskifti, sum geva okkum orsøk til at halda, at í upplýsingunum í ESG tølunum í frágreiðingini fyri 2025 hjá P/F Fønix eru týðandi skeivleikar, og ikki í øllum týðandi lutum er gjørd í samsvari við tann roknskaparhátt, sum felagið hevur nýtt og greitt frá á síðu 7 - 10. Niðurstøðan eigur at verða lisin í samanhangi við tað, sum er skrivað í restini av hesari váttanini.

## Tað vit vátta

Vavið á okkara arbeiði er avmarkað til váttan um ESG lyklatølini, ið eru endurgivin á síðu 6, í ESG frágreiðingini hjá P/F Fønix fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2025.

## Brúktir fakligir standardar og stigið fyri vissu

Váttan okkara er gjørd við avmarkaðari vissu í samsvari við ISAE 3000 (dagførd), "Aðrar váttanir við vissu enn grannskoðan og gjøgnumgongd av søguligum upplýsingum". Ein uppgáva við avmarkaðari vissu er væl minni í vavi enn ein uppgáva við grundaðari vissu, bæði viðvíkjandi arbeiðinum í sambandi við meting av váðum, íroknað fatan av innaneftirlitinum, og tað, sum er gjørt grundað á metta váðan. Hetta viðførir, at stigið fyri vissu, sum verður fingið í sambandi við eina uppgávu við avmarkaðari vissu, er væl lægri enn vissan, sum hevði verið fingin í sambandi við eina uppgávu við grundaðari vissu.

## Okkara óheftni og góðskustýringsskipan

Vit hava hildið ásetingarnar um óheftni og onnur etisk krøv í etisku reglunum fyri góðkendar grannskoðarar, sum byggja á grundleggjandi meginreglurnar um falsloysi, partsloysi, yrkisførleika og neyðugt nærlagni, trúnað og yrkisatburð. Grannskoðanarvirkið Januar er bundið at halda altjóða standardin um góðskustýring, ISQM 1, og brúkar soleiðis eina umfatandi góðskustýringsskipan, herundir skjalprógvaðar politikkir og mannagongdir viðvíkjandi tí at halda etisk krøv, yrkisstandardar og galdandi ásetingar í lóg og øðrum reglum. Arbeiði okkara var gjørt av einum óheftum toymi við royndum innan frágreiðingar um burðardygd og váttanir.

## Fatan av rapporterings- og virðisásetingarháttunum

Upplýsingarnar eiga at verða lisnar og skiltar saman við roknskaparháttinum sum bóklingurin hjá Burðardygt vinnulív hevur tilmælt, og sum leiðslan hevur eina ábyrgd av at velja og seta í verk. Fráveran av royndum viðvíkjandi føstum mannagongdum at brúka sum útgangsstøði fyri metingum av ikki-fíggjarligum upplýsingum letur upp fyri øðrvísi, men góðtiknum virðisásetingarhættum og kann ávirka samanberingina millum eindir og yvir tíð.

## Gjørda arbeiðið

Vit taka hædd fyri váðanum fyri týðandi skeivleikum í upplýsingunum, tá vit leggja til rættis og gera okkara arbeiði. Við at gera hetta og grundað á okkara fakligu metingar, hava vit:

- Gjørt samrøður við ábyrgdarhavandi fyri strategileiðslu og rapportering viðvíkjandi ESG lyklatølum.
- Gjørt eina meting av týdningi og raðfestingina av evnum til ESG frágreiðingina hjá P/F Fønix fyri 2025 og samanborið við úrslit av fjølmiðlaleiting.
- Lisið og mett um leiðreglur fyri rapportering og innanhýsis eftirlitsmannagongdir viðvíkjandi upplýsingunum, sum eru brúktar í ESG frágreiðingini fyri 2025.
- Gjøgnumgingið og greinað útvaldar upplýsingar viðvíkjandi váttanaruppgávuni, sum eru móttiknar frá øllum framleiðslustøðum.
- Mett um innanhýsis og uttanhýsis skjalprógv fyri at taka støðu til, um upplýsingarnar í ESG frágreiðingini eru undirbygdar við nøktandi prógvum.
- Lisið aðrar upplýsingar, sum eru við í ESG frágreiðingini hjá P/F Fønix fyri 2025, fyri at staðfesta, um nakað er av týðandi ósamsvari millum útvaldu

upplýsingarnar viðvíkjandi okkara váttanaruppgávu og okkara váttan við avmarkaðari vissu um hetta.

## Ábyrgd leiðslunnar

Leiðslan í P/F Fønix hevur ábyrgdina av:

- At leggja til rættis, seta í verk og halda viðlíka innanhýsis eftirlit av upplýsingunum, sum viðkoma uppseting av upplýsingum í ESG frágreiðingini, sum eru uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.
- Uppbyggja partsleysan roknskaparhátt til at uppseta upplýsingar.
- Virðisáseting og rapportering av upplýsingunum í ESG frágreiðingini grundað á nýtta roknskaparháttin.
- Innihaldið í ESG frágreiðingini fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2025.

## Ábyrgd okkara

Vit hava ábyrgdina av:

- At leggja til rættis og gera arbeiðið fyri at fáa avmarkaða vissu um upplýsingarnar í ESG frágreiðingini hjá P/F Fønix fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2025 í øllum týðandi lutum ikki hava týðandi skeivleikar í samsvari við meginreglurnar, sum eru grundarlag undir váttanini.
- Gera eina óhefta niðurstøðu grundað á arbeiðið, sum vit hava gjørt og prógvini, sum vit hava fingið
- Geva ein niðurstøðu til partaeigararnar í P/F Fønix.

Tórshavn, tann 3. juni 2026

**P/F Januar**

løggilt grannskoðanarvirki

Óli Joensen
statsaut. revisor